## DAGSINS MEINING

# Todi á landsliðið

Nú um dagarnar komu vit við inniligari áheitan á landsliðsvenjaran í fótbólti. Henda áheitan snúði seg um at endurskoða avgerðina at vraka okkara fræga fótbóltspælara Toda Jónsson til komandi stórdystir móti Sweits og Írlandi. Vit hava síðani einki frætt frá venjaranum. Men vit hava sæð og hoyrt onnur taka undir við hesi áheitan okkara. So gott sum øll tann føroyska ítróttarpressan er samd um, at tað var eitt mistak, tá venjarin gjørdu av at útiloka Toda frá at spæla á landsliðnum – við eini sera ivasamari grundgeving. Prátið millum fólk er tað sama. Hví útiloka okkara kanska besta fótbóltsspælara nakrantíð frá at royna seg á landsliðnum, nú ongar forðingar eru!

Grundgevingin hjá venjaranum er, at Todi er ikki í dystarvenjing. Og hann vil bert hava spælarar, sum kunnu vera á vøllinum í 90 minuttir. Hetta er so hansara val. Men Todi kann koma at gera munin, tá ástendur, sjálvt um hann ikki kann spæla fullan dyst. Og sjálvt um hinir spæla ein góðan dyst. Okkum tykir henda grundgevingin bæði óprofessionell og mangulfull. Venjarin átti at givið Toda tjansin, nú hann ikki er skæddur, og nú Todi sjálvur hevur víst stóran áhuga fyri at vera við. Og harvið latið hann sloppið at víst síni framúrskarandi evni í verki. Tað er einki minni enn ein katastrofa, tá leiðslan á okkara tjóðarlandsliði kappar hondina av okkara besta fótbóltsspælara. Var hetta hent í øðrum landi hevði har verið einki minni enn fólkauppreistur.

Danski landsliðsvenjarin og ikki minst hansara føroysku hjálparmenn áttu at vitað betur. Okkara fótbóltslandslið er nevniliga ikki bara eitt vanligt landslið. Tað er eisini nakað heilt serligt fyri okkum føroyingar. Tí neyvan finst ein tjóð í heiminum, har so stórur partur av fólkinum gongur so nógv uppí sítt fótbóltslandslið sum nettupp Føroyar. Sum lítil tjóð hava vit eisini brúk fyri at síggja upp til nakað, har vit klára at "hamla" upp við teir stóru. At føla at vit eisini duga. At vit eisini eiga góðar spælarar. At vit eiga ein sterkan vilja. Vit hava sæð, at hóast landsliðið hevur vunnið fáar dystir, so hava úrslitini tó verið so fræg, at fótbóltslandsliðið er vorðið okkara nationali ambassadørur. Okkara eygnasteinur. Okkara skjaldramerki. Tað er hetta, sum Henrik Larsen átti at givið sær fær um. Hvat veruliga bylgist í tí einstaka føroyinginum, tá tað snýr seg um landsliðið!

Og hugsið tykkum – um vit nú fingu nøkur vinnandi stig eisini! Um nú Todi megnaði tað, sum hevur manglað í, nevniliga at skora mál! Uttan at siga nakað negativt um aðrar spælarar so mugu vit staðfesta, at føroyska fótbóltslandsliðið hevur brúk fyri at vinna dystir. Og tað er nú vit hava møguleika fyri at fáa okkara fremsta fótbóltsspælara við í álopið, at vit eiga at taka av. Hetta skal ikki skiljast sum, at vit ikki hava álit á hinum spælarunum. Men Todi er bara nakað meira, tað, sum skal til aftrat.

Landsliðsvenjarin eigur tí at gera sær greitt, hvussu stóran týdning fótbóltslandsliðið hevur fyri alla tjóðina og fyri samleika okkara. Ja so nógv hevur hetta lið at siga fyri okkum øll, at avgerðin hjá venjaranum at kolldøma, vraka og at geva Toda "sekkin" átti at fingið avleiðingar fyri sama venjara. Átti Henrik Larsen ikki at fingið sekkin fyri hesa skeivu avgerð! Við at vraka Toda hevur hann nevniliga skert okkara møguleika at fáa nakrar so hart tiltrongdar sigrar. Føroyska tjóðin skríggjar eftir, at okkara tjóðarlandslið skal vinna á stórum fótbóltstjóðum. Og øll vita, at hetta ber kanska bara til, um vit troyta tað trumfkortið, sum Todi er. Føroya fólk krevur tí nú av landsliðsvenjaranum, at Todi verður á liðnum móti Sweits og Írlandi. Enn er tíð at bøta um mistakið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# YVIRLÝSING FRÁ MIÐFLOKKINUM

**Jenis av Rana**
**Bill Justinussen**

Miðflokkurin mótmælir, at løgmaður og landsstýri við vilja hava hildið týðandi upplýsingum aftur fyri Løgtinginum í málinum um Miðnámsskúlan í Suðuroy. Hetta er greitt brot á § 5 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna, har staðfest verður, at løgmaður ella landsstýrismaður verða revsaðir, um teir, tá Løgtingið viðger eitt mál, tiga við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.

Undir viðgerðini av nevnda máli valdi løgmaður at tiga. Hóast hann ferð eftir ferð varð spurdur av tingsins røðarapalli um viðkomandi viðurskifti í málinum, tagdi hann. Ongantíð undir allari viðgerðini kom fram, at ein arkitektafrágreiðing, umbiðin av landsstýrinum, var gjørd, sum kundi hava avgerandi ávirkan á støðutakanina hjá tingfólki. Tí metir Miðflokkurin, at týðandi upplýsingar eru hildnar aftur fyri Løgtinginum, og er hetta sama niðurstøða, sum landsstýrismannanevndin er komin til.

Miðflokkurin ávarar ímóti teirri vanvirðing, sum løgmaður og landsstýri sýna Løgtingsarbeiðnum. Samstundis undrast Miðflokkurin á, at ongin av teimum 21 í samgonguni eru so mikið at sær komin, at tey tora at mótmæla hesi harðrendu framferð løgmans og landsstýrisins.

Okkara fólkaræði stendur fyri falli, tá evsta vald okkara ikki fylgir teimum lógum, sum av teimum sjálvum eru smíðaðar og samtyktar. Gongdin er ræðandi og eigur at fáa allar ávaringarklokkur at ringja.

**§ 5.** Løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hans~ara.

**Stk. 2.** Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.

# Sosialurin, nazisman og fundamentalistar

**Svenning av Lofti**



Hugaligt var at lesa oddagreinina "Ongantíð aftur" í Sosialinum herfyri, har skrivað varð um fall nazismunnar fyri seksti árum síðani. Eg fegnist saman við oddagreinskrivaranum um, at tað eydnaðist at basa nazismuni. Somuleiðis tá sagt verður: "Hvørki nazisma ella rasisma kunnu góðtakast og eiga øll rætthugsandi menniskju at vera á varðhaldi."

Tí skilji eg ikki at politikkarar, blaðfólk og at Sosialurin sjálvur í oddagreinum hevur nýtt orðið "fundamentalistar" um bíbliutrúgv kristin í okkara egna landi, vitandi at orðið hevur fingið negativan og illavorðnan týdning, og verða tí tey, sum verða skýrd at vera "fundamentalistar" í Føroyum sammett við islamiskar fundamentalistar, sum spreingja seg sjálvar, hús og sakleys fólk í luftina.

Nazisman nýtti júst hendan framferðarháttin: At kalla jødar fyri líkt og ólíkt og soleiðis lítisvirða tey sum menniskju og mettu tey vera "undirmenniskju". Úrslitið gav seg skjótt til kennar: Handlar og synagogur hjá jødum vóru rænd og brend í grund. Jødar máttu bera spjaldur - jødastjørnuna - ið boðaði frá, at tey vóru ein undirmettur tjóðflokkur og soleiðis kundu verða jagstraðir, niðraðir, niðurgjørdir og háðaðir. Men hetta var eisini miðvísa ætlan nazistanna. Haldi kortini ikki at hetta er miðvísa ætlanin hjá Sosialinum og øðrum fjølmiðlum.

Men eg vil við hesum peika á hvussu propagandamaskinan hjá naz-istunum arbeiddi. Tað byrjaði í smáum, men endaði í ljósum loga og í roykinum frá gasskømurunum í týningarlegunum.

Tað var ein føroyskur politikkari, sum í sínari tíð hevði tað fyri at samanbera føroyskar javnaðarmenn við kommunistar. Hetta var ein skeiv og niðrandi samanbering. Endamálið var eyðsæð: At geva eina villeiðandi og ræðandi mynd av landsmonnum, ið vóru politiskir mótstøðumenn og samanbera teir við ómenniskjansligu brotgerðirnar, ið kommunistarnir framdu, t.d. í gamla Sovjetsamveldinum.

Tí er mín áheitan á blaðstjóran á Sosialinum og aðrar fjølmiðlar um at ikki at nýta orðið fundamentalistur um landsmenn sínar, vitandi at hetta orðið hevur fingið ein so ljótan negativan týdning orsakað av ómenniskjaligum yvirgangsatsóknum úti í heimi. Betri er at nýta orðið "bíbliutrúgvur", at hann ella hon eru bíbliutrúgv.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.